einfaldari
- ger tað einfaldari
Apríl 2012

# OM Transform 2012



OM Transform verður aftur í summar við 40 ymiskum toymum í 18 londum. Farið verður m.a. at evangelisera á strondum í Portugal, at hjálpa til at smíða og mála í Norðurafrika og til Ísrael at bera jødum og muslimum gleðiboðskapin.

OM Transform var fyrstu ferð í 2010 og var til stóra signing og frelsu fyri mong menniskju. 450 milliónir menniskju búgva í teimum 20 londunum kring Miðalhavið. Hóast kristnar røtur, so kenna tey fæstu søguna um Jesus Kristus, ei heldur vita tey, hvør Hann er.

Øll toymini verða fyrst saman til fyrireiking á Transformstevnu í Rom í Italia frá 16. til 21. juli. Les meira á www.om.fo ella ring til Ruth Gaardlykke á tel. 51 90 90.

lívdin
– í livd hins hægsta
Tíðindi Kunning Lýsingar Skráir

## Verdur at tilbiðja

Sálmarnir 120-134 verða kallaðir "Á hátíðarferðum". Hesir 15 sálmar vórðu sungnir, tá ið ísraelsfólk ferðaðust til Jerúsalem at hátíðarhalda stóru høgtíðirnar. Á páskum streymaði fólkið inn í býin og upp á tempulpallin. Men áðrenn tey kundu fara upp gjørnum trappurnar í sunnara enda á templinum, máttu tey fara gjøgnum eina reinsingarseremoni kallað "Miqba" soleiðis at tey kundu fara rein inn fyri ásjón Harrans. Trinini vóru 15 í tali, og fyri hvørt trin sungu tey Sálm 120-134.

Tey byrjaðu at syngja: "Til Harran rópti eg í neyðini;" síðani: "Eg lyfti upp eygu míni móti fløllunum;" og síðani: "Eg varð glaður, tá ið sagt varð við meg: Vit skulu fara í hús Harrans," líka til tey komu til síðsta sálm og síðsta trin, tá ið tey sungu: "Upp, lovið Harranum, allir tit tænarar Harrans." Og við hesum traðkaðu tey inn í páskahøgtíðina at tilbiðja Gud - rein og lýtaleys. Mátti Harrin hjálpt okkum at gera okkum klár og lýtaleys til páskirnar, og mátti Hann hjálpt okkum at síggja, at páskalamb okkara, Jesus Kristus, av sonnum er verdur at tilbiðja.



*Góðar páskir!*
*Jógvan Zachariassen*

# HENDINGAR & TILTØK

## Altjóða leiðarastevnan flutt til 2013



Á GLS-ráðstevnuni (Global Leadership Summit) í Norðurlandahúsinum í fjør varð kunngjørt, at næsta GLS-ráðstevna verður hildin 26. og 27. oktober 2012. Men vegna tað, at ikki ber til at fáa Norðurlandahúsið tá, hevur nevndin fyri GLS avgjørt at flyta ráðstevnuna.

Næsta GLS-ráðstevnan verður hildin í Norðurlandahúsinum fríggjadagin 11. januar og leygardagin 12. januar 2013. Avgerðin er tikin, tí at við at halda stevnuna í januar hevur nevndin tryggjað sær, at Norðurlandahúsið er tøkt til GLS stevnur tey komandi árini. Komandi árini verður stevnan eftir ætlan hildin í januar mánaði. Les meira á www.gls.fo

## Johannes Christian Poulsen





Leygardagin 3. mars andaðist Johannes Christian Poulsen á Tjarnargarði, 92 ára gamal. Jóhannes, sum var ættaður frá Ljósá, var seinnu árini ofta á møti í Lívdini, har vit hoyrdu hann bera sín vitnisburð fram um Harran. Vit minnast Johannes við takksemi.

## Plágast av okkara egnu fatan

Menniskjað plágast ikki av veruleikanum, sum hann er, men av síni egnu fatan av veruleikanum.

(-sitat)



## Familjulegurnar 2012

Um Gud vil, er ætlanin aftur í ár at hava familjulegur á Zarepta í Vatnsoyrum.

Familjulega 1 Frí. 01.06 – hós. 07.06. 2012
Familjulega 2 Frí. 08.06. – hós. 14.06. 2012
Familjulega 3 Frí. 15.06. – hós. 21.06. 2012
Familjulega 4 Frí. 22.06. – hós. 28.06. 2012
Familjulega 5 Hós. 28.06.–sun.01.07. 2012
*Fyri familjur við børnum, ið bera brek.
Familjulega 6 Sun. 26.08. – ley. 01.09.

Tilmelding til familjulegurnar fer fram á www.zarepta.fo

## TeenStreet 2012




Tilmeldingin til TeenStreet 2012 er byrjað. Legan verður í Oldenburg í Týsklandi frá 28. juli til 4. august. Les meira um ferðing og prísir á www.teenstreet.fo undir "Alt um TS2012". Seinasta freist at tekna seg er 22. apríl.

## Samtalur og forbøn

Fólk frá Glóðini eru tøk aftan á seinna møtið sunnudagar at samtala ella at gera avtalu um samtalu. Glóðin er ein tænasta í Lívdini, ið er ein útrættur armur til menniskju, sum hava eitthvørt at stríðast við sum t.d. tunglyndi, ótta, sorg, vreiði, hjúnabandsviðurskifti ella tvístøður. Fólkini í Glóðini hava tagnarskyldu. Eisini ber til at venda tær til Glóðina á tlf. 280011.

## Iktus




Sjónvarpsrásin IKTUS sendir regluliga talur úr Lívdini. Sent verður mikudag til leygardag kl.11:00, 16:00, 21:00 og 02:00. Sunnudag frá kl.14:30 og 21:00 verður endursent frá vikuni.

Sí skránna og les meira á www.iktus.fo.

## Bøn og undirvísing

Týskvøld kl. 20.30 er møti í Lonini oman Hoydalar 28. Triðja hvørt týskvøld eru kyknubólkar.

## Skráin fyri týskvøldini apríl 2012

| | |
|---|---|
| Týskvøldið 3. apríl | Kyknubólkar |
| Týskvøldið 10. apríl | Bønarmøti |
| Týskvøldið 17. apríl | Dópsskeið |
| Mánakvøldið 23. apríl | Dópur í Hebron á Argjum |
| Týskvøldið 24. apríl | Kyknubólkar |



# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

**Sunnudagin 1. apríl**

Familjumøti kl. 10.30: Kvinnubønarbólkurin luttekur

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Bíblian – 66 kærleiksbrøv:
...sum ljós fyri seg...(Róm.-Filemon)
Talari: Gunnar Nielsen

UngLív kl. 12.00 Evni: Himmalin
Undirvísari: Jógvan Zachariassen


Gunnar

**Sunnudagin 8. apríl**

*Serlig møtir páskamorgun*
*(einki Hoyvíksmøti, eingin sunnudagsskúli og UngLív)*

Kl. 6.30: "Sólarris" lovsongsløta úti
Umleið kl. 8.00: Morgunmatur í Lonini
Kl. 10.30: Familjumøti – serligt páskamøti


Jógvan

**Sunnudagin 15. apríl**

Familjumøti kl. 10.30: Hedvig Jóhansdóttir hugleiðir um frælsi

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Bíblian – 66 kærleiksbrøv:
...í øllum umstøðum...(Heb.-Judas)
Talari: Høgni Johannesen

UngLív kl. 12.00 Evni: Ápostlasøgan (søguliga....)
Undirvísari: Poul Guttesen


Hedvig

**Sunnudagin 22. apríl**

Familjumøti kl. 10.30: Torkil Mørkøre luttekur

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Bíblian – 66 kærleiksbrøv:
...inntil vit koma heim...(Opinberingin og endi á røðini)
Talari: Jógvan Zachariassen

UngLív kl. 12.00 Evni: Einglar -
Undirvísari: Jens Wang

**Sunnudagin 29. apríl**

Familjumøti kl. 10.30:

Hoyvíksmøti kl. 12.00: Evni: Eg og Gud
Talari: Absalon Áargarð

UngLív kl. 12.00 Evni: Ápostlasøgan (framhald)
Undirvísari: Jóhan Syderbø


Absalon

**Ungdómstiltøk:**

Alive: leygarkvøld kl. 21.00

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*